

*Fólk savnaðist frammanfyri pallin, tá VOX sang*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Túsund fólk á Fjarðafestivali

**Fleiri enn túsund áhoyrarar vóru komnir saman, tá Fjarðafestivalurin fór av bakkastokki við fleiri góðum framførslum, ið óvanliga góðum karmum**

UMRØÐA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrsta kvøldið á Fjarðafestivalinum var væleydnað við fleiri enn túsund áhoyrarunum, ið tyktust at hugna sær í teimum frálíku kørmunum, ið Keldan er. Hetta kvøldið var sambært Vinjardi Johansen, fyrireikarar fyrst og fremst ætla teimum, ið vanliga ganga á møti og í kirkju, sjálvur rópti fyrireikarin hetta eitt gospel sangkvøld, men tað hevði ivaleyst verið líka sigandi at kalla tað eitt sangmøti. Bróðurparturin av bólkunum løgdu upp til felagssang, og í nógvum førum var stórskíggin, sum annars hýsti Føroya Banka lýsingum, nýttur til at varpa upp tekstin í løgunum, og hetta eydnaðist væl sangurin ljómaði inniliga, tá Føroya best syngjandi áhoyrarafjøld livdi við í framførslunum.

Fyrireikararnir fegnast um, hvussu væl kvøldið hevði gingið. Tey 250 starvsfólkini gjørdu øll sítt arbeiði til lítar, verður boðað frá.

Í fjør var skráin nakað seinkað, men henda trupulleika hevði Fjarðafestivalurin loyst í ár. Bill Justinussen hevði tikið sær eina løtu burturi frá politiska meldrinum og stýrdi pallinum við eini harðari hond, so skráin var hildin. Í kvøld skilst, at onkur annar skal røkja henda leiklut, men tað er at vónað, at tað gongur eins væl sum hjá Bill.



*Bæði ung og gomul vóru komin saman, tá Fjarðafestivalurin fór av bakkastokki.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Karmarnir í Kelduni eru framúrskarandi til tílík tiltøk*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Øðrvísi upplivingar

Útlendsku nøvnini Charizma, Jerusalem, Trond Erics og teir tveir agentarnir frá CAA lendu í gjár og eftir ætlan lenda amerikonsku stjørnurnar Pillar um tað mundið at hetta blaðið kemur í handlarnar, og hesi nøvn fara saman við eini ørgrynnu av føroyskum nøvnum at bjóða okkum upplivingar, ið uttan iva verður heldur øðrvísi, enn tær vit upplivdu fyrsta kvøldið.